RIO · BRAVO RESTAURANT

frá 26. nov. og til jóla

## Jól fyri kræsnar gómar

**Forrættur**
Innbakaðir vatnkrabbahalar við rómaosti,
borðreiddir á broyskna salat,
við kremaðari hummaraglasering

**Steik**
Pesto-grillerað dunnubringa,
fylt við fríslum kryddurtum.
Borðreidd á sellerikompot
við smørgrillaðum eplum,
grønmeti undan árstíðini og súreplasauce.

**Omaná**
Hunangsmelón við sólbersorbet og fruktpuré

Vel millum 2 verðar 250,-
ella 3 verðar 300,-
Borðbílegging á 319767

**Bon Appetit!**




TEAM85




# Vinnarin av teknikapping heiðraður á Giljanesi

**Felagið Vágar fer sunnudagin at handa vinnaranum av teknikappingini, sum fyrstu flokkarnir í Vágum hava luttikið í, virðisløn á jólasølustevnuni á Giljanesi**

TEKNIKAPPING

Teknikappingin, sum Felagið Vágar hevur skipað fyri millum fyrstu flokkarnar í skúlunum í Vágum, er liðug, og vinnarin er funnin. Vinnarin fær handaða virðisløn á jólasølustevnuni, sum verður á Giljanesi um vikuskiftið. Handanin verður sunnudagin klokkan 16.00.

Børnini, sum hava luttikið í kappingini, hava kappast um at gera bestu tekningina at prýða jólaposan, sum handlarnir í Felagnum Vágar fara at nýta um jólini. Allar tekningarnar, sum hava luttikið í kappingini, verða at síggja á jólasølustevnuni um vikuskiftið.

Tað er Miðvágs Róðrarfelag, sum skipar fyri jólasølustevnuni. Hetta er vorðið afturvendandi tiltak seinasta vikuskiftið í november.

Felagið Vágar, umboðað av Kunningarstovuni, hevur egnan bás á stevnuni hesaferð.

**ej**




## TÚ SÆRT "GOTT" ÚT

DANSK VINDUE CERTIFICERING tryggjar tær, at tíni vindeygu og hurðar eru gjørd úr fyrstafloks tilfari, at tey lúka allar treytir innan byggivinnuna, og at góðskan er í hásæti.

ISO 9001 tryggjar ta somu góðskuna í øllum tilfarinum - hvørja ferð tú keypir.

Alt hetta kann Import bjóða tær!

Import kann bjóða vindeygu og hurðar úr træ, plast ella alutræ.

Um tygum ynskja tilboð til ísetan, ella okkurt skuldi verið áfatt, so samstarvar Import við Sp/f Byggicon.

Vindeygu og hurðar koma frá VIKA vinduer í Danmark

TRÆ

- Vindeygu og hurðar eru framleidd úr kjarnutræ. Kjarnutræ kann ikki rotna tí tað inniheldur í mesta lagi 20% vætu. Rot byrjar við 28–30%.
- Bakfestar glaslistar og síðan segling við sikafleks. T.v.s. ongir sjónligir seymir, ið kunnu rusta
- Superlágorkuglas U:1,1v/argon gass
- Øll skoyti eru tappað saman
- Vinnuyvirflatuviðgerð ið gevur sera sterkt haldføri
- Impregnering v/Fungicider (soppadrepara)/ grundmálað/millumslípað og síðani sluttlakk.
  Miðallagstjúkdin er 160 um (vanligt er 90 um)
- Aluminium drypplisti
- 116 mm karmur
- Hitagalvaniserað hongsul v/messingtappi

PLASTIKK

- Rehauprofilur - heimsins mest nýtti profilur til plastvindeygu og hurðar.
- Galvaniserað jarnramma í vindeyga og karmi fyri at styrkja um
- Superlágorkuglas U:1,1v/argon gass
- 120 mm karmur
- 3 pkt. lásmekanisma á hurðum og min. 2 á vindeygum
- Gráir gummilistar uttaná og hvítir listar innan fyri glasið
- Glaslistar á innsíðu fyri at tryggja móti innbroti
- Hondtøk av merkinum Hoppe fylgja við
- Plastikkvindeyga við træsniði



IMPORT

V/TONI DAM · POSTBOKS 3070 · FO 110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
TEL 513 842 · FAX 321 421 · IMPORT@IMPORT.FO · WWW.IMPORT.FO

**5 ára trygd móti framleiðslu- og tilfarsbreki! - Fleiri upplýsingar eru at finna á www.import.fo**



# Vikuskifti

Nr. 228 • Vikuskiftið 27./28. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


Greinarøð um evnið
‘Skapanarlæra mótvegis
menningarlæru’

Lesið síðu 37–40






*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Tá babba kemur heim

Tá babba fer avstað, eri eg so kedd, men tá hann kemur heim aftur, er tað so deiligt, at eg púrasta gloymi, hvussu kedd eg var, tá hann fór


SJÓMANNABARN
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*


Pápi mín siglir við einum stórum trolara, og hann er ræðuliga leingi burtur. Tá hann fer avstað, eri eg so kedd, tí tað verður so leingi, til eg síggi hann aftur.

Fyrr, tá eg var lítil, græt eg, tá babba fór. Men tað geri eg ikki longur, tí nú eri eg níggju ár, og eg tori ikki at gráta, tí tað er so flóvisligt, haldi eg.

Tá vit standa á keiuni og vinka farvæl, kemur ein stórur klumpur í hálsin á mær, og eg føli tað, sum eg vil kvalast - og tað er akkurát, sum okkurt trýstir tárini úr eygunum á mær.

Børnini siga við meg, at eg eri so heldig, tí pápi mín er sjómaður og altíð keypir mær okkurt gott heim við. Men eg haldi, at tey eru nógv heldigari, tí tey hava altíð pápar sínar heima hjá sær.

Tey vita slett ikki, hvussu ringt tað er at leingjast so illa, og hvussu keðiligt tað er, at babba so sjáldan kann koma við mær til alt tað, sum teirra pápar kunnu.

Babba hevur verið burtur í okkurt um tveyhundrað leygardagar og sunnudagar av mínum lívi. Um eg telji allar dagarnar, sum hann hevur verið heimanífrá, síðani eg varð fødd, so verða tað nógv meira enn túsund dagar tilsamans.

### Vit bæði verða glað

Men, tá babba kemur heim, er alt gott aftur, og vit eru saman alla tíðina og gera alt møguligt stuttligt.

Vit fiska í ánni og fara langar túrar, viðhvørt á súklu og onkuntíð til gongu, og tá tað er kalt úti, so bakar babba pannukøkur, og vit gera bróstsukur ella kóka kakao.

Um kvøldarnar spæla vit kort ella ludo - og tá tað er songartíð, so ballar babba meg og fortelur mær nógvar spennandi søgur.

Søgurnar, mær dámar best, eru tær um, tá babba var lítil sjálvur. Tað haldi eg er so spennandi at hoyra. Tann allarmest spennandi søgan er um ta ferðina, tá abbi hevði verið so leingi til skips, at babba ikki kendi hann, tá hann kom aftur.

Seinast babba kom aftur fekk eg eina tráðu, og eg eri so spent at vita, hvat hann fer at keypa mær heim við næstu ferð.

Eg haldi, at eg eri ordiliga heldig allíkavæl ...